

*Frásøgumaðurin Jákup Magnussen saman við íslendsku gestunum í Nylon handan leiktjøldini á Jóansøkufestivalinum í 2005.*

# Jákup Magnussen sigur frá

**Røddin er kend frá útvarpi og óteljandi ferðir hevur hann verið frásøgumaður, tá stór tiltøk hava verið. Jákup Magnussen hevur royndirnar og dugur kynstrið at leiða festivalgestirnar trygt ígjøgnum festivalskránna og soleiðis verður eisini á Jóansøkufestivalinum í ár**

JÓANSØKUFESTIVALUR

Røddin er ein hin kendasta í landinum. Jákup Magnussen er ein kend útvarpsrødd, men mong kenna hana eisini frá so mongum tiltakið, har hann hevur verið frásøgumaður, t.d. við mongu Prix Føroyar konsertirnar, men hann hevur enntá eisni roynt seg við klassiskum, tá nýggjárskonsert hevur verið í Norðurlandahúsinum.

At "verða á" live er ongin trupulleiki hjá Jákupi. Hann trívist kanska best, tá tað hendir her og nú, freistast ein at halda. Tað vit seinast minnast Jákup frá í útvarpshøpi eru frálíku livesendingarnar seinnapartar, ið høvdu heitið Nón.

Eins og í fjør, so verður tað Jákup Magnussen, ið verður live á Jóansøkufestivalinum sum frásøgumaður, ein uppgáva, ið hann altíð megnar til UG.

Meðan bólkarnir gera seg klárar at fara á pallin at framføra live, er tað Jákup Magnussen, ið leiðir festivalgestirnar frá einum bólki til annan við teimum boðum, upplýsingum og kanska skemtiligu viðmerkingum, ið hóska til støðuna.

Leiklutur frásøgumansins skal ikki undirmetast, tí tað er hann,, ið oftast skal á pallin, men við einum tí mest roynda á økinum, er Jóansøkufestivalurin í góðum hondum aftur í ár.



*Nylon á Jóansøkufestivalinum í fjør*

# Jóansøkufestivalurin satsaði rætt

**Tá Jóansøkufestivalurin í fjør valdi at fáa íslendska gentubólkin Nylon til Føroya, var hetta at gott val, tí nú hevur bólkurin verið á stórari tónleikaferð við einum av stóru nøvnunum innan tónlekin**

JÓANSØKUFESTIVALUR

Ungu genturnar í Nylon gjørdust eitt av tveimum útlendskum nøvnum á fyrsta Jóansøkufestivalinum, sum var í fjør. Høvuðsnavn var AS Sweet.

At velja júst Nylon vísti seg ikki at vera heilt av leið. Bólkurin gjørdist ikki ein samdøgursfluga, men hevur bert voksið seg størri og betri.

Tær hava nú endað eina tónleikaferð, har tær hava verið upphitingarbólkur hjá kenda bólkinum Westlife á teirra stóru tónleikaferð í vetur og í vár.

Og slíkan møguleika er tað ikki ein og hvør og at genturnar í Nylon hava notið ferðina sæst, um ein vitjar heimasíðu teirra nylon.is, har nýggjur tónleikur frá teirra síðu eisini er at hoyra.


